# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI:

# Pirates of Caribbean – Ein sjómansskrøna

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

So var aftur tíð til ein skjótan sjórænarafilm við tí óføra Johnny Depp. Hesaferð hevur hin ríki Lord Cutler Beckett blandað seg í brúdleypið hjá Elizebeth Swann og vápnasmiðin Will Turner, hetta tí hesin skal hava hjálpt sjórænarinum Jack Sparrow (Johnny Depp) við at bróta úr skansanum. Hendan góða Elizabeth endar tí við at standa einamøll eftir á altarinum. Hvat er nú til at taka?
Einasta loysnin er at venda sær til hendan Jack Sparrow, men Lord Cutler Beckett er bert úti eftir einum og tað er júst at fáa hendur á Jack Sparrow og stóra skattinum. Hetta er meiri ella minni søgan í hesum langa filminum.

**Hey ho og ein fløska av rom, deyða ræð og ein kista við gulli**
Síðandi er ein øgiligur bardagi um tey sjey høvini. Hesin Beckett vil meiri enn at gera av við Sparrow, han vil eisini geva sær sjálvum einkarætt at dríva handil. Við eitt er nærum øll enska marinan í hølunum á Sparrow. Eisini hin svagligi Davy Jones er eftir Sparrow. Hesin er vanliga hin seinasti nakar vil møta og eisini hin seinasti sjófólk vanliga møta, tí hann ger av við tey. Davy Jones bjóðar hýru umborð á skipinum hjá sær, hetta í allan ævinleika, ella deyðin.

**Tey eta sínar gudar**
Jack Sparrow dugir at hugna sær, hann býr á eini tropiskar oyggj, har tey inføddu halda hann vera ein gud. Hann er ikki áhugaður í at sigla vandasjógv meiri. Nú er gott at vera ein gudur, men av og á hendir at tey inføddu eta teirra gudar, so Jack er ikki so tryggur. Samstundis er Elizabeth farin at loysa trupuleikarnar hjá sínum elskaði Will, ja og Jack. Hon fer so út í heimin klædd sum ein drongur. Soleiðis sær søgan út, øll jagstra øl, og øll vilja hava part av dýrgripinum.
Jack fer við skipinum The Black Pearl, meðan Will møtir pápa sínum Bootstrap Bill, Elizabeth fer upp at berjast og Davy Jones hevur lova sínum ódjórið Kraken at rokast, tí nú skal vera sjórænaragildi.

**So er útpurring**
Hetta er sum tey flestu vita ikki hin fyrsti Pirates of the Caribbean filmurin. Hin kom fyri trimum árum síðani. Hesin kom av einum av skemtiligu tilboðunum í Disneyland, filmurin megnaði at blæsa lív í gamla sjórænarafilmin, ið er eitt filmslag, ið nærum er líka so gamalt sum Hollywood. Einasti munurin er, at tað nú eru Johnny Depp og ikki Erol Flynn, ið sveiggjar sær í togunum. Tað lá tí nærum í sjókortinum, ella í "skatta"kortinum, at hesin Pirates of the Caribbean: Død mands kiste, skuldi gerðast. Alt er sum so við tað gamla, her eru Johnny, Orlando og Keira, her eru skipið The Black Pearl og entá Flúgvandi Hollendarin, ið Davy Jones er skipari á.

**Ein stinkandi myta**
Framleiðarnir hava ikki lakt lítið fyri, ella grammleikin eftir gullkistunum í Hollywood hava fingið manningina at gera tveir (!) filmar í senn. Her skal alt við, hvør spinkul gomlum rommstinkandi myta, ið skrønan um sjórænarnar hevur boða. Her eru Kraken, og yvirtrúgv av øllum slagi. Her er søgan um Davy Jones' Locker (havsins botnur), hesuferð fáa vit at vita søguna um East Asia Trading Company og hvussu ómenniskjalig søgan er um hesar.

**Depp er góður**
Johnny Depp hevur aftur hug at spæla sjórænari, hann er ein góður sjónleikari, ið hevur spælt frægari leiklutir enn júst hendan. Leikluturin sum sjórænari líkist meiri einum frítíarítrivið, tí Depp dugir annars væl at væl at velja leiklutir, seinast var hann hin ótrúligi Willy Wonka í Charlie and The Chocolat Factory. Hann hevur eisini spælt góðar filmar sum Finding Newerland, Blow, Fear and Loathing in Las Vegas, Dead Man. Depp er eisini góður í hesum filminum, hóðast filmur er í so langur. 150 minuttir er alt ov langt fyri eina so tunna søgu.
Við í filminum er sum sakt eisini Orlando Bloom (kendur sum Paris í Troya og Legolas í The Lord of The Rings) sum Will Turner og Keira Knightley, ið eru farin vegin frá at vera nærum ókend til at verða heimskend.
Eg veit ikki um hendan genran sjórænarafilmurin ikki hevur yvirliva seg sjálva, serliga í hesi romantieraðu Disneykendu barnvinaligu útgávuni. Eg hevði vilja sæð eina harða uppgerð við 1800tals sjórænararomantikkin, líkasum Clint Eastwood gjørdi nærum av við westernfilmin í Unforgiven. Helst er okkurt um hesar skrønurnar um sjórænarar, men hesin ummælarin sat mest og geispaði í yvir 2 tímar, tí søgan er alt for kitsj og alt er for karikera, var tað ikki fyri Depp, so datt filmurin á gólvið við einum brakið, tó er u løtur av góðum undirhaldi at síggja.

3 stjørnur av 6. .

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

## Vinningur í juli

**Familjupakki til Summarfestivalin:**

- 2 atgongumerki til vaksin
- 2 atgongumerki til børn
- Gávukort á kr. 1.000,-

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 3. august kl. 10.00 og merkið bjálvan »Sudoku«.

Drigið verður fyrstu vikuna í august.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar vera loystar.




## SUDOKU

## JULI KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | | | 5 | | 4 | 8 | | 1 |
| | 3 | | 9 | | 8 | | 6 | 7 |
| | 2 | 1 | | | | | | |
| 7 | | 8 | 2 | | | 6 | 9 | |
| | | | 3 | | 7 | | | |
| | 1 | 9 | | | 6 | 5 | | 2 |
| | | | | | | 3 | 8 | |
| 1 | 5 | | 4 | | 9 | | 2 | |
| 2 | | 6 | 7 | | 5 | | | 4 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 5 | | 9 | | | |
| 1 | | 6 | | 7 | | 5 | | 3 |
| 5 | 8 | | | | | | 9 | 6 |
| | | 1 | 8 | | 7 | 9 | | |
| | 7 | | | | | | 4 | |
| | | 9 | 2 | | 5 | 8 | | |
| 3 | 6 | | | | | | 7 | 1 |
| 9 | | 5 | | 3 | | 6 | | 4 |
| | | | 6 | | 2 | | | |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | | | 1 | | 2 | | 3 | |
| | 9 | | | | | 7 | | |
| | | 6 | | 9 | 8 | | | 4 |
| | | | 3 | | | 2 | | |
| | 5 | | | | | | 9 | |
| | | 7 | | | 9 | | | |
| 3 | | | 6 | 8 | | 9 | | |
| | | 8 | | | | | 1 | |
| | 1 | | 7 | | 5 | | | 8 |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | 6 | | | 3 | | 4 | | |
| | | 3 | | | 1 | | | 7 |
| 5 | | | | | | 1 | | |
| 1 | | | 3 | | | | | |
| 7 | | | | 9 | | | | 5 |
| | | | | | 5 | | | 8 |
| | | 9 | | | | | | 4 |
| 4 | | | 6 | | | 2 | | |
| | | 8 | | 2 | | | 9 | 1 |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

TELEFON: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin